## Skal útflýggjast

Rætturin í Stockholm gjørdi í gjár av, at handilsmaðurin Michael Ljungmann skal útflýggjast til Danmkarkar eftir áheitan frá danska ákæruvaldinum. Michael Ljungmann hevði tætt samstarv við Stein Bagger, og danska ákæruvaldið vil vera við, at svenski handilsmaðurin hevur svikað fyri 266 milliónir krónur. Michael Ljungmann hevur fyrr sagt, at hann vil ikki fara til Danmarkar, og hann hevur nú tríggjar vikur til at kæra avgerðina hjá rættinum í Stockholm. Michael Ljungmann býr í New York, men hevur verið í Svøáríki síðani í apríl, har hann skal sita 10 mánaðir í fongsli fyri svik.



# Framtíðin við nýggjum avbjóðingum og møguleikum



*- Vit eru heppin, at Føroyar liggja í heimsins reinasta havi, sum átti at verið ein avgerandi og seljandi "faktorur", tá vit skulu marknaðarføra okkum kring um heimin, segði Heðin Mortensen, borgarstjóri, tá hann setti Fish Expo Faroes 2009 í morgun*

**- Vegurin úr kreppuni er bert hin eini – hart arbeiði, bjartskygni og trúgvin á, at tað altíð er eitt ljós hinumegin tunnilin. Eg havi varhugan av, at vit júst við hesi stevnu eru til reiðar at leggja okkum í seðlan og hyggja frameftir – í staðin fyri at brúka orkuna til tað, sum vit kortini einki kunnu gera við, segði Heðin Mortensen, borgarstjóri, tá hann setti Fish Expo Faroes 2009 í Gundadali í morgun**

FISH EXPO FAROES
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Í morgun klokkan gott 10 setti borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, stóru og fjølbroyttu fiskivinnustevnuna, Fish Expo Faroes 2009. Stevnan verður hildin í leigaðum tjøldum á niðara fótbóltsvølli í Gundadali, og tað var eisini her, at setanin fór fram í góðveðrinum í morgun. Sjálv setanin fór fram innandura, men kundi eins væl verið úti á fótbóltsvøllinum, nú veðrið royndist so frálíka væl.

Tá stevnan varð hildin í stóru høllini á Sandvíkarhjalla, fór setanin fram beint frammanfyri inngongdina. Tí kunnu vit siga, at meðan seinasta stóra fiskivinnustevnan varð hildin í Føroyum, var sjálv framsýningin undir taki, meðan setanin var úti. Nú verður framsýningin hildin "úti" – ella í tjøldum – men setanin fór fram inni.

### Kærkomið "pust"

Borgarstjórin segði, at tað er honum ein heiður vegna Tórshavnar kommunu at bjóða fólki vælkomnum til Havnar og vælkomnum til Føroya.

- Hetta er aftur ein stór fiskivunnustevna, sum vit hava glett okkum til og hava sett okkum so stórar vónir til.

Hann vísti á, at í eini tíð, har so nógv verður tosað um altjóða kreppu, og har tað eru mong, sum eru svartskygd um framtíðina, er henda stevna eitt "deiligt frisk pust", sum borgarstjórin tók til.

- Sjálvt um vit øll vita, at tað ongantíð er rætt at síggja burtur frá veruleikum, nú stormur blæsir um okkum, er Fish Expo Faroes eitt tekin um, at heimurin ikki stendur í stað kortini.

Borgarstjórin helt, at skulu vit endiliga fokusera upp á kreppuna, sum hann tók til, so er vegurin úr henni bert hin eini – nevniliga við hørðum arbeiði, bjartskygni og eini trúgv á, at tað altíð er eitt ljós hinumegin tunnilin.

- Eg havi varhugan av, at vit júst her við hesi stevnu eru til reiðar at leggja okkum í seðlan og hyggja frameftir – í staðin fyri at brúka orkuna til tað, sum vit kortini einki kunnu gera við.

Hann segði seg fegnast um, at tey, sum standa aftanfyri Fish Expo Faroes, hava stórar ambitiónir og stórt framfýsni, sum júst er tað, vit kunnu koma longst við.

- Øll tit, sum hava gjørt av at vera við á framsýningini, eru soleiðis við til at stimbra og geva okkum øllum íblástur. Tit hava gjørt tykkara til, at henda fiskivinnustevna kann haldast næstu tríggjar dagarnar, segði Heðin Mortensen.

### Ein sjálvfylgja

- At ein slík fiskivinnustevna verður hildin í Føroyum, er næstan størsta sjálvfylgjan av øllum, tá vit eru umringaði av havinum og í stóran mun liva av tí, sum upp úr havinum kemur.

Borgarstjórin vísti á, at Føroyar eru eitt fiskivinnusamfelag, har fiskur er okkara høvuðs útflutningsvøra.

- Vit eru eisini heppin, at Føroyar liggja í heimsins reinasta havi, sum átti at verið ein avgerandi og seljandi "faktorur", tá vit skulu marknaðarføra okkum kring um heimin. At fiskiídnaðurin hevur stóran týdning og stóran áhuga, fara vit ivaleyst at síggja hesar dagarnar, stevnan verður hildin.

Heðin nevndi, at eini 10.000-12.000 fólk helst fara at vitja á Fish Expo Faroes 2009, og hetta byggir hann á tøl yvir vitjandi, sum aðrar slíkar stevnur í Føroyum hava havt.

### Stórt útboð

Framsýningarøkið í tjøldunum, har framsýningin er, er tilsamans einar 4.000 fermetrar.

- Her eru nógvir útbjóðarar og nógvir møguleikar, og eg ivist onga løtu í, at her verða stórir handlar



*Havnar Hornorkestur setti sín dám á setanina í morgun við løttum og frískum tónum*